STUTT SAGT

## Avbyrgd av skógareldi



*Nógvir skógareldar eru í USA í hesum døgum.*

Umleið 800 ferðafólk og eini 150 starvsfólk í teirri stóru amerikonsku tjóðarlundini Grand Canyon sleppa ongan veg, eftir at ein skógareldur hevur stongt ta einastu farleiðina haðani, skrivar AP.

Skógareldurin kyknaði sunnukvøldið beint við North Rim, sum er eisini farleið til og úr Grand Canyon-lundini. Amerikonsku myndugleikarnir siga, at hvørki ferðafólk ella starvsfólk eru í vanda, og í dag varð rokna viuð, at øll sluppu haðani seinnapartin ella í kvøld.

Skógareldurin í Grand Canyon er ikki tann einasti, sum herjar USA í hesum døgum. Tað brennur nógvastaðni, og myndugleikarnir siga, at í løtuni standa umleið 1,3 millión hektarar av skógi í ljósum loga.

## Arkitektar tiknir

Løgreglan í Pólandi hevur tikið tríggjar arkitektar í sambandi við vanlukkuna, tá takið á einari framsýningarhøll í býnum Chorzow hoyknaði undan kava fyri fimm mánaðum síðani. Vanlukkan kravdi 65 mannalív.

Vanlukkan er tann størsta av sínum slagi í Pólandi nakrantíð, og verða arkitektarnir funnir sekir í byggifuski, kunnu teir fáa upp í átta ára fongsul. Teir tríggir menninir eru ávikavist 46, 48 og 69 ára gamlir.

Umleið 200 fólk vóru inni í framsýningarhøllini í Chorzow, tá takið hoyknaði undan kavanum.

## ROJ skal út

Myndugleikarnir í Turkalandi royna at leggja trýst á ES-nevndina fyri at fáa hana at nokta tíðindafólki hjá kurdisku sjónvarpsstøðini ROJ atgongd til ES-skrivstovurnar í Bruxelles.

Nevndin hevur víst turkiska kravinum frá sær, men kurdiska sjónvarpskvinnan Senem Guneser sigur við danska útvarpið, at hon fær ikki somu møguleikar á ES-skrivstovunum sum onnur tíðindafólk. Eitt nú sleppur hon ikki inn í upptøkuhølið, sum er ætlað tíðindafólki, og hon sigur seg hava fingið at vita, at tað hóvar ikki turkisku stjórnini, at hon er har.

Turkiska stjórnin heldur uppá, at ROJ-sjónvarpið er partur av PKK, sum stendur á listanum yvir yvirgangsfelagsskapir, og tí heldur Turkaland ikki, at tíðindafólk hjá sjónvarpinum eiga at hava atgongd til ES-skrivstovurnar. ES hevur kortini víst turkiska kravinum frá sær við teirri grundgeving, at sambært belgisku myndugleikunum hevur ROJ einki samband við yvirgang.

## Italiumenn søgdu nei

Ein stórur meiriluti av italsku veljarunum hava vrakað eitt uppskot um at broyta grundlógina, soleiðis at forsætisráðharrin fekk meiri vald, og at teir einstøku landspartarnir fingu størri sjálvræði. Fólkaatkvøða var um uppskotið sunnudagin og í gjár, men tá uppteljingin var liðug, høvdu bara 38 prosent atkvøtt fyri uppskotinum. 62 prosent søgdu nei.

Tað var stjórnin hjá Silvio Berlusconi, sum legði uppskotið fyri fólkið, men tann nýggja stjórnin hjá Romano Prodi, forsætisráðharra mælti fólkinum frá at taka undir við tí. Sambært Berlusconi hevði tann ætlaða grundlógarbroytingin givið Italia tryggari politisk viðurskifti. Tað kundi ivaleyst verið tiltrongt, tí síðani seinna heimsbardaga hevur landið havt ikki færri enn 61 stjórnir. Romano Prodi hevur eisini sagt, at ávísir partar av grundlógini eru ikki tíðarhóskandi longur, men at uppskotið hjá fyrrverandi stjórnini hevði miðsavnað valdið í ov stóran mun.

47 milliónir italiumenn høvdu atkvøðurætt á fólkaatkvøðuni, men næstan helmingurin sat við hús.

# Letur 220 milliardir til góð endamál

**Amerikanarin Warren Buffett er heimsins næstríkasti maður, men nú letur hann tað mesta av ognini til góð endamál**

RÍKIDØMI
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*



*Warren Buffett letur næstan alla sína ogn til vælgerandi endamál*

Hildið verður, at heimskendi amerikanski íleggjarin Warren Buffett eigur 44 milliardir dollarar ella einar 261 milliardir krónur, og at hann sostatt er næstríkasti maður í heiminum eftir Bill Gates.

Warres Buffet hevur savnað sínar pengar í virðisbrøv í fyritøkuni Berkshire Hathaway og á bankabókini, men nú hevur hann 75 ára gamli ríkmaðurin gjørt av at geva tað mesta burtur. Í samrøðu við tíðarritið Forbes sigur hann, at í næsta mánað fer hann undir at lata øðrum 85 prosent av sínari ogn. Tað svarar til 221 milliardir krónur.

Nógv tann største partin av pengunum ella fimm sættapartar hevur hann gjørt av at lata hjálpargrunninum Bill & Melinda Gates Foundation. Hitt verður býtt ímillum ymdar aðrar vælgerandi felagsskapir og grunnar.

Warren Buffett er kendur sum ein lítillátin maður. Hann býr framvegis í einum húsum í statinum Omaha, sum hann keypti í 1958 fyri 190.000 krónur.

# Stórreiðari flaggar út

**Norski stórreiðarin Wilhelm Wilhelmsen skrásetir flotan uttanlands.**

SKIPARAKSTUR
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Wilhelm Wilhelmsen hevur sum so mangir aðrir norskir reiðarar roynt at útvega norskum reiðaríum somu skattareglur, sum reiðarí í øðrum evropeiskum londum hava, men til fánýtis. Nú gevst hann við royndunum og hevur gjørt av at flagga skipini út, skrivar Aftenposten.

Reiðaríið hjá Wilhelm Wilhelmsen er saman við tí svenska Wallenius tað størsta í heiminum, tá tað snýr seg um bilflutning. Felagið eigur 150 bilaflutningsskip og hevur bílagt ikki færri enn 42 nýbygningar. Felagið hevur 13.500 starvsfólk í 72 londum, og í fjør gav raksturin 1,3 milliard krónur í avlopi.

Tað er ikki bara Wilhelm Wilhelmsen, sum umhugsar at strika tað norska flaggið, og fleiri reiðarí hava longu gjørt tað sama. Fyri nøkrum fáum árum síðani var Noreg triðstørsta sjóferðslutjóðin í heiminum mátað í tonsatali. Í dag er landið nummar sjey á listanum.

# Afghanistan kann enda sum Irak

Hernaðarserfrøðingar bera nú ótta fyri, at viðurskiftini í Afghanistan kunnu gerast sum í Irak. Teir vísa sambært AP á, at Taliban hevur framgongd har suðuri í landinum hóast umfatandi átøk hjá teimum útlendsku hermonnunum.

Samstundis er tað annars so góða umdømið hjá Hamid Karzai, forseta farið at rilla, ikki bara innanlands, men eisini uttanlands. Nógvir afghanar hava ikki álit á honum longur, og Washington Post skrivar, at fleiri evropeisk lond hava eisini mist álitið á honum.

Blaðið sigur eisini frá óskili í landinum. Millum annað ljóðar, at løgreglumenn gera seg inn á ferðafólk og ræna ognir teirra, størv í almennu umsitingini verða seld fyri hægsta boð, rúsevnahandilsmenn gera, sum teimum lystir, og útlendskir hjálparpengar koma ongantíð vegin fram.